Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52 í Tingskipanini

Spyrjari: Magna Eliana Mørkøre, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Heilivágur innan føroysk røktarheim og heimatænastu

Spurningar:

1. Er nøkur ætlan at endurskoða lóggávu viðvíkjandi heilivági í primera geiranum?

Viðmerkingar:
Ein partur av arbeiðinum á sambýlum, ellisheimum, røktarheimum og í heimatænastuni er at geva linnandi røkt til borgarar, ið liggja til tað síðsta - eisini kallað terminala røkt. Til hetta er ofta tørvur á at geva heilivág.

Sum lóggávan er í dag hava sambýli, ellisheim, røktarheim og heimatænastan ikki loyvi at liggja inni við heilivági, sum ikki er tilskrivaður einum borgara - adrenalin er undantikið.

Heilivágur, ið verður brúktur til terminala røkt, krevur læknaliga ávísing. Tað vil siga, at heilivágurin skal koma frá apotekinum.

Røktarheim, sum liggja uttan fyri miðstaðarøkið, uppliva ofta eina avbjóðingin við at fáa heilivágin til tíðina. Tá borgarar liggja til tað síðsta, ber tað ikki til bíða eftir Posta, har bíðitíðin kann vera upp til tveir dagar og enn longri í vikuskiftinum. Ofta brúka avvarðandi dýrabara tíð uppá at koyra til og frá apoteki. Tíð, sum kundi verið brúkt saman við sínum nærmastu.

Í eitt nú Danmark verður ein sokallaður *tryggleikakassi* brúktur. Hesin kassin inniheldur heilivág, ið verður brúktur til terminalar borgarar, sum hava tørv á linnandi heilivági. Nøgdin røkkur til á leið eitt samdøgur. Hetta ger, at borgarin kann fáa linnandi heilivág, so skjótt sum læknin hevur givið ávísing.

Allir føroyingar - óansæð hvar í landinum tey búgva - hava rætt til eina virðiliga fráferð úr hesum heimi. Soleiðis er tíverri ikki í dag, men hetta kann broytast, um røktarheim, ellisheim, sambýli og heimatænastan sambært lógini fáa loyvi at hava eina heilivágsgoymslu til terminalan linna.

Á Løgtingi, 28. mars 2023

Magna Eliana Mørkøre